# Tað endaliga samgonguskjalið

**Tann 10 januar í ár varð nýtt landsstýri skipað millum javnaðarflokkin, tjóðveldisflokkin, sjálvstýrisflokkin og kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk.**

**Grundarlagið undir hesi samgongu er tað skjalið, sum hesir fýra flokkar skrivaðu undir tíðliga hósmorgunin — sama dag, sum val fór fram av løgmanni og landsstýrismonnum.**

**Útkastið til samgonguskjalið varð prentað í fleiri bløðum herfyri. Í dag prenta vit tað endaliga skjalið.**





Føroya Javnaðarflokkur, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin — Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur eru samdir um at ganga saman um skipan av landsstýri aftaná løgtingsvalið 1984.

Sum grundarlag undir tí politikki, sum skal rekast í valskeiðinum, eru flokkarnir samdir um hesa skrá:

Førdur verður ein fíggjar- og búskaparpolitikkur, ið kann roynast trygt støði fyri vinnuligt og alment virksemi og neyvt stýrdari útbygging.

Sýnt verður størsta varsemi í almennari peninganýtslu eins og privat nýtsla og íløgur verða undir strongum eftirliti.

Landið skal hava innlit har tað luttekur í ábyrgdini og ávirkan, tá eginpeningur er settur í.

Stevna samgongurnar er at leggja búskapin so til rættis, at størst møgulig varandi tjóðarúrtøka fæst burturúr náttúrugivna ríkidøminum, at hava vinnu fyri allar vinnuførar hendur og at vissa øllum stættum rímuligan og rættvísan part av tjóðarúrtøkuni, og ansa eftir, at størri byrðar ikki verða lagdar á inntøkuveiku stættirnar.

Møguleikar landsstýrisins at fremja eina veruliga búskaparstýring verða útbygdir, og skipað verður búskapardeild í landsumsitingini til tess at samskipa alt virksemi, ið viðvíkur peningagongd, rentustøði, lántøkum, íløgum, skatting og tolling eins og hagfrøðisligu skrásetingini. Lógin um búskaparráð verður endurskoðað undir búskapardeildini. samskipað undir búskapardeildini. Miðað verður ímóti at leggja partar av hesum virksemi til landsbankan at umsita, tá hesin fer at virka.

Løgd verður fýra ára íløguætlan, sum í høvuðsheitum strikar upp týdningarmiklu íløgurnar í hesum árum. Her verður hugsað um bæði almennar og vinnuligar íløgur. Hesar íløguætlanir skulu endurskoðast árliga, tá fíggjarlógirnar verða gjørdar.

## Fiskivinnumál



Fiskivinnupolitikkurin tekur grundstøði í tí livandi ríkidømi, ið finst innan fyri føroyska fiskimarkið soleiðis, at hetta verður troytt á hin skynsamligasta og mest lønandi hátt.

Skilagóð stovnsrøkt skal tryggja,at hetta ríkidømi støðugt kann endur-

Framhald á síðu 15

